Við slupp fram við landi

Einasta føroyskt bygda sluppin, Norðlýsið, er umbygd til ferðamannaskip, og verður nú millum annað nýtt til at kanna helli og gjáir, sum vit eiga so mong undir okkara stórslignu bjørgum

Norðlýsið er kendur gestur við føroysku strendurnar

ORÐ OG MYNDIR:
EDVARD JOENSEN

Við Bursatanga liggur sluppin Norðlýsið klár at fara útferð við ferðafólki, sum ætlar at uppliva eitt føroysk summarkvøld á floti. Vit eru í fyrstu viku av juli mánaða. Veðrið er av tí besta, tú ført í Føroyum. Sólin stendur høgt á luftini, einki skýgg á himmalinum, og bert eitt fleyr, soleiðis, at flaggið í mesanmastrini so dánt stendur frá.

Tey flestu eru longu komin. Einir tríggir danir. Útgjørdir til ferðina í skipstroyggju og við teimum tunnu oljuklæðunum í hondini. Hvat ryggsekkirnir goyma, er ikki til at meta um, men teir síggja reiðiliga fyltir út. Kikara og fototól hangandi um hálsin. Jú tey hava gjørt seg út og ætla at fáa nakað burturúr.

Týskararnir eru sum vanligt nágreiniliga fyrireikaðir. Umframt somu útgerðina, sum danirnir, hava teir bæði proviant og kort. Ivaleyst hava teir eisini GPS og fartelefon í ryggsekkinum.

Mær rennur í hug hina ferðina, vit skuldu fara at skjóta við trýbekkinum hjá abbanum. Abbin var vorðin gamal og kom ikki við. Men tað var næstan ikki endi á allari útgerðini, havast skuldi við. Har var ongin slingur í valsinum. Tá farið varð á flot, visti ein ikki, nær komið varð aftur, og so skuldi einki lívsneyðugt vænta í.

Og soleiðis er eisini við skipinum, vit í kvøld skulu við. Hóast skrokkurin var smíðaður í 1945, og plankarnir sostatt eru farnir um ta hálvu øldina, er hetta als eingin aldur hjá einum træskipi. Aðrar sluppir, vit kenna, eru jú meira enn dupult so gamlar. Og tað, sum Tórshavnar Skipasmiðja hevur latið úr hondum, plagar ikki at sláa falskar mentur.

Men skipið er tó ikki riggað, sum tað var, tá tað varð flotað fyrstu ferð. Í 1989 varð tað umbygt og sett í tann stand, tað í dag er í. Stór salong við 14 koyggjum, messa og maskinrúm umframt ein kahytt við trimum koyggjum eru undir dekki. Stýrihus er við teimum nútíðarhentleikum, sum tíðin krevur. Saniteru viðurskiftini eru í lagi. Brúsa er umborð umframt tvey wc. Maskinan er nýggj. Ein 200 hk. MWM varð ísett, tá skipið varð umbygt í 1989. Til ber at raka sær við 220V elektriskari maskinu. Og so er bjargingarútgerðin sjálvandi. Skipið hevur loyvi at hava 52 ferðafólk umborð, men bjargingarúrgerð er til heili 65 fólk.

Vindleys segl

Ája, tá øll eru komin, er klokkan farin einar tíggju minuttir av sjey, og vit loysa. Siglt verður við maskinuni út um grótkastið. Síðan verðu lagt stilt. Nú skulu seglini setast. Tað gongur fínt, men lotið er bara so lítið, at tað er mest við streyminum, vit flyta okkum. So tá seglini eru sett, eru vit komin suður fyri grótkastið á Argjum, og har er stilli. Sett verður so í gongd aftur og siglt út á fjørðin, soleiðis, at lýggja summarfleyrið, sum kýnir Reyninum, fær lyft eitt lítið sindur í dúkin, sum tó ikki tambast. Men nú eru vit komin út á eystfallið, so tað hjálpir eisini til. Men drúgvt man fara at vera at náða Boðanum við seglum eina.

Tá tú stendur soleiðis á dekkinum á hesum stásiliga og vælhildna farinum og hyggur teg um, er lætt at skilja Jógvan í Grindavísuni, sum helt at: » den, som ligger af lyst på land, han er vist på gale veje.« Einki ljóð hoyrist. Fólk standa sum undir lestri og hyggja at tí, sum livir í sjónum. Lundarnir eru ikki so tættir her, sum væntast kann eystanfyri. Men tað vaðar longri uppi í firðinum. Rita og terna í hópatali. Og so kom hatta beistið, skúgvurin, og oyðilegði allan idyllin. Allastaðni er hatta og ger ónáðir. Ein donsk kona helt tað vera synd í rituni, at hon soleiðis skuldi verða sundurskrødd. Men einki er at gera við.

Vit nærkast nú Boðanum, og skiparin hevur sett maskinuna í gongd, so nú líður betri eftir. Hann er eisini komin við nøkrum tráðum og heldur, at vit fara at kasta beint eystur úr Stongini. Onkur smáfiskur fæst kanska.

Komin eystur um, doyr lotið púra burtur, so hildið verður frægast bara at strika seglini. Tá tað er gjørt, eru vit komin á leið har, ætlanin var at kasta. Og skjótt rennur út av spølunum. Einir fimm, seks pilkar liggja í senn, men ymiskt er handalagið, tá heintað verður. Men hvussu er og ikki, so er ein týskari fyrstur, sum kennir. Ein fittur brondingur, sum verður kelaður og klappaður; fyri ikki at tala um fotograferingina.

Ikki øll hava kastað kortini. Tað tykist, sum okkurt áhugavert er at síggja aftan fyri skipið, tí har samlast so nógv fólk á hekkuni. Sum á Orminum Langa kundi sannast, at: »syrgiligt var á miðjum skipi, tí har tók fólk at tynnast.« Men skjótt skiltist, at grundin var tann, at skiparin var farin at fortelja røvarasøgur. Og tað dugir hann væl.

Hesir hava gott útsýni

Helli og gjáir

Ikki varð tað stóra fiskaríið burturúr kortini. Vit gera upp og seta í gongd aftur. Nú verður farið suður við Nólsoynni eystantil. Hóast liðið er á kvøldið, er væl av fugli at síggja fyri Urðini. Mest lundi, men eisini okkurt ljósari á liti. Ein bátur kemur norður við landinum. Hevur verið og fingið sær at kóka, og maðurin, aftan fyri húsið, er í ferð við at kryvja. Tað er eitt levint, tær halda, likkurnar. Hesir evindaligu, irriterandi skræðugákarnir, sum eru so frekir, at maðurin mestsum má goyma fiskin, hann hevur kruvt, so tær ikki taka hann úr skutinum. Men fremmandafólkini halda stuttligt vera og taka myndir.

Skiparin sigur frá, at ætlanin er at gera útferðir, har farið verður við smáum bátum inn í gjáirnar, sum allastaðni eru at síggja undir bjørgunum, vit sigla framvið. Í kvøld verður tó eingin slíkur túrur. Men skrá er løgd, har roknað er við túrum bæði undir Nólsoynna og vestantil undir Hestbjørgunum. Eisini verða ferðir gjørdar til Dímunnar. So tann, sum hevur hug at síggja landið í neðra, hevur almikið at gleða seg til.

Útferðir

Tað er líkt til, at P/F Útferðir hava rakt papageykin, tá farið varð undir at skipa fyri hesum ferðunum við Norðlýsinum. Hevur tú verið í Bláu Holunum á Malta, gloymir tú tað ikki. Men tað er heilt givið, at hann, sum hevur verið inni á látrunum undir føroysku bjørgunum, so sanniliga eisini hevur fingið eitt upplivilsi fyri lívið. Av sonnum ein møguleiki av teimum frægu at marknaðarføra okkara náttúru sum ferðamannamál. Vit hava so lítið annað.

Er áhugi fyri at leiga skipið til eina útferð við gestum, handilssambondum ella tílíkum, ber samstundis til at fáa skipað fyri mati umborð. Borðreitt verður vanliga við tí, skiparin nevnir sjóbitar. Til dømis skeljamat. Ella, um talan er um fiskitúrar, ber væl til at matgera við tí, ein sjálvur hevur veitt. »Sig mær, hvat tú ynskir, og vit gera tað, vit kunnu.«

Umborð á Norðlýsinum

Júst matgerðin hjá skiparanum er vorðin viðagitin. Og hann er maður við visiónum. Ikki bara fæst hann við mat , uttan eisini gongur hann við størri ætlanum í høvdinum.

Ein tann seinasta er at byggja út ferðavinnuna í Hesti í stóran mun. Ætlanin gongur í stuttum út uppá, at tað skal bera til at ganga runt alla oynna. At gera matstað vestantil á oynni og samstundis at nýta helli vestantil til konserthøll.

Umstøðurnar eru soleiðis, at til ber at koma at hesum støðum frá í erva við eitt sindur av forarbeiði. Soleiðis at økið kann brúkast alt árið, uttan mun til veður og vind.

Hetta er stór ætlan, sum eisini ljóðar spennandi, og sum fer at verða nærri umrødd í grein í komandi blaði.

Upplýsingar um túrarnar hjá Norðlýsinum ber til at fáa í vanligari arbeiðstíð við at venda sær til skrivstovuna hjá Smyril Line.
Tlf. nr. 31 59 00
Teldupostur:
office@smyril-line.fo

Um vikuskiftini fæst at vita frá Hotel Føroyum
Tlf. nr. 31 75 00
Teldupostur:
hotel-fo@post.olivant.fo

Lesa um olju á Handilsskúlanum

Seinastu dagarnar hava tey tr‡, Sigmund Rosnes, Ragnar Magnussen og Ingvil Smines Josdal, fundast dúgliga um, hvussu n‡ggja útbúgvingin skal skipast
mynd: Jens Kr. Vang

Í heyst ver›ur skjøtul settur á n‡ggjar útbúgvingar á Føroya Handilsskúla. At byrja vi› í smærri pørtum, men vi› ætlan um eina stø›uga ví›kan av tilbo›num

JÁKUP MØRK

Føroya Handilsskúli hevur seinastu 10-15 árini havt eina stø›uga og mi›vísa menning, har útbúgvingarførleiki skúlans er øktur alsamt. Sostatt ber í dag til at taka hópin av ymsum skei›um hjá skei›tænastu skúlans, umframt at eisini ber til at taka HD prógv á sta›num.

Oljuútbúgving

Nú er so ætlanin, at útbúgvingartilbo›ini skulu økjast enn meira, og í heyst ver›ur skjøtul settur á fyrsta partin av eini n‡ggjari oljuútbúgving.

Útbúgvingin er li›ur í arbei›inum hjá oljuútbúgvingarsamtakinum, og til tess at ney›ugi serkunnleikin skal vera vi› í ætlanini, ver›ur útbúgvingin gjørd í samstarvi vi› BI handilsháskúlan í Stavanger.

BI var upprunaliga ein vinnubúskaparligur skúli, men vi› tí›ini er hesin útbygdur, og millum anna› er skúlin millum fremstu skúlarnar í Noregi, tá umræ›ur oljuútbúgvingar. Stavanger hevur jú sí›ani sekstiárini veri› høvu›sb‡urin í norskari oljuvinnu, og tí er vi› tí›ini uppbygdur ein stórur serkunnleiki á júst hesum øki.

Tillaga› samfelagnum

Seinastu dagarnar hava so tey bæ›i, Sigmund Rosnes og Ingvil Smines Josdal, veri› í Føroyum, har tey saman vi› umbo›um frá Handilsskúlanum hava lagt fyrstu partarnar av útbúgvingini til rættis.

At ta› júst eru hesi bæ›i, sum eru á føroyavitjan, er so avgjørt ikki av tilvild. BI hevur sum vera man eitt ótal av útbúgvingar- og skei›stilbo›um, og flestu av hesum ver›ur roynt at geva luttakarunum eina brei›a vitan innan ymisk øki. Umframt hetta, so lata tey eisini sonevnd skræddaraseyma› skei›, sum kanska bert eru ætla›i einum parti av vinnuni, ella onkrum ávísum øki, og hesum partinum av arbei›inum stendur Ingvil fyri.

Sostatt er ætlanin, at útbúgvingar- og skei›stilbo›ini, sum vera í Føroyum, skulu vera mi›víst tillaga› teimum serføroysku vi›urskiftunum, sum eru galdandi í Føroyum.

Í hesum sambandi er sjálvsagt ney›ugt, at vinnan ver›ur tikin vi› upp á rá›, og ta› er í hesum sambandi, at Sigmun Rosnes er aktuellur. Tilkn‡ti hansara til IB er nevnliga, at hann av og á heldur fyrilestrar av ymsum slag. Dagliga starvast hann sum lei›ari hjá japanska oljufelagnum, AEDC, sum hevur deild í Noreg. Hann hevur ígjøgnum nógv ár fingi› drúgvar royndir um, hvussu skúli og vinnulív kunnu samskipast.

Tey bæ›i grei›a frá, at ta› er av alstórum t‡dningi, at útbúgvingartilbo›ini ver›a tillaga›i samfelagnum, har ta› fyrst og fremst er ætlanin, at tey skulu n‡tast. Sosatt eru umbo› fyri vinnuna eisini vi› í fyrireikingararbei›inum. Tó merkir hetta ikki á nakran hátt, at talan er um somiki› serstakar loysnir, at hetta ikki kann n‡tast í samband vi› ví›ari lesna a›rasta›ni.

Ví›ka útbúgvingina

Ein partur av teimum tilbúgvingum, sum skulu gerast, nú ein føroysk oljuvinna eftir øllum at døma stendur fyri framman, eru tey sonevndu HMS-krøvini. Hetta eru krøv vi›víkjandi, heilsu, umhvørvi og trygd, sum ver›a sett eini oljuvinnu.

Føroya Handilsskúli hevur fingi› til uppgávu at skipa fyri útbúgving á hesum økinum, og hetta ver›ur eisini ta› fyrsta, sum fari› ver›ur í holt vi›, sigur Ragnar Magnussen, stjóri á Handilsskúlanum.

Somulei›is hevur BI fingi› hesa uppgávu í Noreg, og tí kann hesin partur av n‡ggju útbúgvingini fara í holt rættuliga skjótt. Hetta tí krøvini hjá norsku og føroysku myndugleikunum ivaleyst fara at líkjast nógv á hesum øki.

Arbei›i› vi› hesum er longu komi› naka› ávegis, og mi›a› ver›ur eftir, at fyrsta kunningin hesum vi›víkjandi ver›ur samstundis, sum avgerin um fyrsta útbjó›ingarumfar ver›ur kunngjørd. Fyrstu skei›ini ver›a so ætlandi hildin seinni í heyst.

Upp á longri sikt er ætlanin, at talan skal gerast um eina rættuliga útbúgving, møguliga sum partur av eini BA, men fyri fyrst ver›ur talan í størstan mun um skei› av ymsum slag, sum tó eisini geva stig til framtí›ar útbúgvingar.

Ræ›ur um at vera vi›

Í hesum sambandi sigur Sigmund Rosnes, at ta› er av alstórum t‡dningi, at virkir, sum kunnu gerast partur av eini møguligari oljuvinnu, hava starvsfólk vi› ney›uga førleikanum.

Í hesum sambandi ver›ur ikki bert hugsa› um tey virki, sum beinlei›is ver›a partur av vinnuni, men so at siga alt ta› virksemi, sum á einhvønn hátt er avleitt av oljuvinnuni.

Samstarv bá›ar vegir

Sum nevnt, so hevur BI alstóran førleika at lata Handilsskúlanum, men talan ver›ur als ikki um naka› einvegis samstarv.

Tey bæ›i, Sigmund og Ingvil, siga seg vera ovfarin av, hvussu nógv Handilsskúlan hev›i at bjó›a.

– Ikki tí, vit vóru beinanvegin áhuga, tá Handilsskúlin setti seg í samband vi› okkum, tí vit mi›ja› eftir at hava ein altjó›a skúla, sigur Ingvil. Hon leggur tó afturat, at samstarvi› so avgjørt ikki tykist minni spennandi nú, tí umframt at vera eitt samstarv tvørtur um landamørk, síggja tey nú eisini stórar møguleikar í at læna føreika og serkunnleika frá hvørjum ø›rum.